## ... um mentan

Mentanin savnar fjøldina, fær fólk til at standa saman. Samstundis kann mentanin spjaða, deila meiningar hjá fólki og birta í kjak. Tað ger mentanina til nakað serligt.



## ... um ferðavinnu

Føroyar mugu koma við í upplivingarvinnuna. Tað veri seg til teambuilding, rekreaktión osv. SamVit kann vera katalysatorurin á hesum øki. Men so mangla vit also framvegis ein alternativan flogvøll.

# inn í tómleikan



*Foto: Jonna Johannesen*

why. Hann droymir seg burtur. Skríggjar seg burtur. I love it – I need it, syngur hann.

- Løgini handla um menniskjalagnur. Eg vil fegin fortelja okkurt við mínum tónleiki, og hetta er onkursvegna sum at venda ranguna út á mær sjálvum. Tónleikurin sigur væl altíð nakað um ta støðu, man er í júst í løtuni. Men samstundis snýr tað seg um at fylgja hjartanum og gera tað, einum dámar allarbest. Fyri meg er tað at spæla tónleik.

### Ivin spøkir

Fyrstu løgini hava sveimað gjøgnum mixpultar og allan vegin út í cyperspace, har tey liggja klár at vigast og metast.

- Akkurát tá eg eri liðugur við eitt lag, fer adrenalinið gjøgnum kroppin, og tað kennist fantastiskt. Men nakrar dagar seinni sníkir kenslan av, at hetta er nakað lort, seg inn í gleðina. Um hetta gevur meining fyri nakran annan enn meg sjálvan. Men so fer tað hinvegin aftur.

Tað er tíðiligt, at hann hevur verið henda túrin nakrar ferðir. At hann bæði hevur merkt adrenalinið og óttan. Men hann tykist vera til reiðar.

- Ja, eg eri glaður fyri løgini. Eg blívi ongantíð heilt nøgdur, og óttin spøkir tó framvegis viðhvørt. Kanska eri eg bara bangin fyri at blotta meg. Bangin fyri, hvat fólk halda. Men eg føli, at eg má koma út við hesum nú. At hetta kann eg standa inni fyri, sigur Jóhan Johannesen.

Og áðrenn hann fær sementera setningin við eini kunstpausu, viðgongur hann blankt, at hann er bangin.

- Ja, eg eri ræðuliga bangin. Bangin fyri, at fólki ikki dámar tónleikin. Eg vil, at tað skal vera gott. At tað skal geva onkrum nakað.

- Men samstundis spæli eg líka so nógv tónleik fyri at liva. Og eg veit ikki, hvat alternativið hevði verið, um eg ikki slapp at spæla tónleik, leggur hann afturat.

### Á egnum beinum

Jóhan Johannesen hevur valt at standa fyri øllum sjálvur. Hann hevur skrivað tekstirnar og smíða løgini, og hann hevur eisini staðið fyri tí praktiska við at fáa upptøkurnar í lag saman við professionellum tónleikarum. Men, sum hann leggur dent á, við góðari hjálp frá lærumeistara sínum, ið eisini telist millum tónleikararnar á upptøkunum. Trý løg eru liðugt framleidd, og umframt at tey liggja á internetinum, verða tey send plátufeløgunum í hesum døgum. Onnur løg eru á veg, og seinni í ár gevur hann út eina fløgu, har somu tónleikarar sum á fyrstu løgunum ætlandi eru við.

- Eg elski at spæla tónleik, og eg droymi um at sleppa at spæla enn meira tónleik. Mín ambitión er, at eg skal vera glaður fyri tann tónleikin, ið eg geri. Eg vil føla, at eg havi gjørt nakað liðugt, og tá vil eg sleppa út við tí, sigur Jóhan Johannesen.

Samstundis ásannar hann, at tað helst hevði verið stuttligari, um hann hevði eitt fast orkestur at byggja sín tónleik upp saman við og kring.

Hóast Jóhan Johannesen higartil hevur aftrað seg, so er hann nú til reiðar at geva tí ein kjans og taka tónleikin fram um alt annað, skuldi tað lagað seg soleiðis. Og hann gleðir seg til at sleppa út at spæla.

- Jú, absolut. Eg gleði meg til tann dagin. Tónleikurin hevur fylt so nógv í mær frá barnsbeini, og hevur givið mær ótrúliga nógv. Eg haldi, at tað heila byrjar so smátt at geva meining, sigur hann sannførandi.

*I've got a picture of my mind*
*I've got a picture of my mind*
*It so divided it's hard to choose*
*Either way I win or loose*
*I got to find my way to day*

*I got to find my way to day*
*I got to figure out a way*
*I'm tired of working 9-5*
*When my head is in the sky*
*Playing music is the reason why*

*Dream, dream I love it - I need it*
*Scream, scream I love it – I need it*
*Bababa....*

*When my head is in the sky*
*Imagination makes me high*
*The ticking from a fax maschine*
*Is the killer of my dream*
*And the mother of real life*

## Fakta

Jóhan Johannesen hevur valt at geva sín tónleik út undir navninum Jó-Han. Fyrstu trý løgini nevnast "Scream", "Frank" og "The Wind", og genran er folk/rock. Teir, ið manna bólkin, eru:

Jóhan Johannesen, sangur og guitar
Mads Demant Jespersen, klaver
Svein-Erik Martinsen, el-guitar
Thomas Bank, contrabas
Mads Beldring, trummur

August Wanngren og Mads Demant Jespersen hava ljóðblanda tónleikin, ið er tikin upp í Sonar studio í Keypmannahavn.

Løgini kunnu hoyrast á myspace-síðuni hjá Jóhan Johannesen, ið nevnist www.myspace.com/musicbyjohan

Løgini eru nú eisini at hoyra á Rás2.